# Dugir tú at seyma?

Søkt verður eftir fólki til hálv-tíðarstarv í Gardinbúðini á Toftum.
Opið er vanligar dagar frá
kl 13.00 - 17.30
og leygardag frá
kl 10.00 - 13.00

Dugir tú at seyma ella hevur áhuga fyri seyming, er tú vælkomin at tosa við okkum



**GARDINBÚÐIN**
Undir Nesinum • 650 Toftir
Tel. 44 80 01 • Far. 22 54 29




# Íbúðalutafelagið Undir Pisuvarða 4

Tilkomin og eldri kunnu nú ogna sær lut í íbúðaognini undir Pisuvarða 4 í Tórshavn.

Vit hugsa serliga um fólk, sum ynskja at flyta úr verandi húsum sínum.

Í húsaognini undir Pisuvarða eru 5 íbúðir, felagsøki og atgongd til vakran urtagarð. Íbúðirnar eru allar klárar at flyta í - 2 í ovastu hædd, 2 í miðhædd og ein í kjallara.

Í lutafelagnum skulu vera 5 lutir. Tey, sum ognast ein lut, vera lutaeigarar í felagnum og fáa sambært viðtøkum felagsins móti gjaldi brúksrætt til eina av íbúðunum.

| | | |
|---|---|---|
| Kostnaður fyri ein lut í íbúðafelagnum er: | fyri A-íbúð: | 190.000 kr. |
| | fyri B-íbúð: | 200.000 kr. |
| | fyri D-íbúð: | 225.000 kr. |

Gjaldast skal har afturat eitt mánaðarligt brúksgjald, gjald fyri hita og el eftir nýtslu fyri hvørja íbúð sær eftir mátara, umframt kostnað fyri viðlíkahald, fyrisiting o.a. Gjøldini vera ásett av aðalfundinum.

Tygum kunnu fáa umsóknarblað og nærri upplýsingartilfar við at seta tygum í samband við skrivstovu innan 20. januar 2002.

**SIGMUND POULSEN, ADV.**

**ADVOKATVIRKIÐ**

**Páll Nielsen Eyðhild Skaalum**
**Sigmund Poulsen Hans Trygvi Teirin**
Skansavegur 1, Postsmoga 85, 110 Tórshavn
Telefon 312171 - Telefax 315874
E-mail: advokat@post.olivant.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niÝanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3291
Navn: P/F D. J. W.
Adressa: Bryggjubakki 22, Postbox 106, 110 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 12.10.2001
ViÝtøkudato: 12.10.2001
Kapitalur: Kr. 750.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 750.000,00 til kurs 10666,67.
Stovnari: Sp/f 22.3.1986, Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn (Sp/f 2874).
Nevnd: Ásdis Hansen, 180 Kaldbak (formaÝur), Annfinn V. Hansen, 180 Kaldbak og Petur Elias Nielsen, 360 Sandavágur.
Stjórn: Annfinn V. Hansen, 180 Kaldbak.
Tekningarreglur: FelagiÝ verÝur teknaÝ av tveimum nevndarlimum saman ella av einum nevndarlimi og einum stjóra saman ella av nevndarformanninum.
GrannskoÝari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 12.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka virksemi viÝ handli, skipavinnu, íløgum og øÝrum líknandi virksemi.

Skráseting Føroya tann 4. januar 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3290
Navn: Sp/f 21. desember 2001

Adressa: 510 Gøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 20.12.2001
Viðtøkudato: 20.12.2001
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Amaliel Schwartz Jacobsen, 510, Jóhan Strømsten, 510 Gøta, Haldur Vang, 650 Toftir, Davis Dalbø, 510 Gøta og Andras Hansen, 510 Gøta.
Stjórn: Amaliel Schwartz Jacobsen, 510 Gøta.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra
Grannskoðari: Sp/f KPMG statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 20.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga partabrøv, handil, ídnaður og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. januar 2002

Kristin Balle




**Byrja verður aftur at dansa í bygdarhúsinum í Hósvík sunnukvøldið 13. januar kl. 19.00. Nýggj pør eru vælkomin, tilmelding á tlf. 422291 - 422425 - 422368**

**Dansibólkurin í Hósvík**

**ALTERNATIVUR HEILSUBATI**
*Við natural therapy & medisini*
UM TÚ LÍÐUR AV:
# Kropp- ella vøddapínu
# Astma & Allergi
# Gikt & øðrum liðasjúkum
# Sodningartrupulleikum
# Forkølilsi, influensa, lungnabruna

KUNNU EISINI:
# Styrkja immunverjuna
# Javnviga nervarnar á fólki við depressión, insomnia, nervosa

OG MANGT ANNAÐ

*Ring til Olgu á tlf 44 86 59/22 42 58*
*e-mail. yoga_63yahoo.com*

Lesið Sosialin




**Uppsetan og skipan av barrum**
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820




# Mylnuhúsið søkir eftir Pedagogum

Mylnuhúsið er ein stovnur í menning. Tí søkja vit eftir 3 pedagogum, at byrja 1/2-2002 ella eftir nærri avtalu, at arbeiða 30 / 40 tíma viku.

Mylnuhúsið er ein samskipaður dagstovnur í dagliga tekur ímóti uml. 99 børnum í aldrinum 0 - 9 ár, við vøggustovu, barnagarði, útibarnagarði og deild til skúlabørn.

Vit leggja stóran dent á, at arbeiða út frá tí børnini eru hugtikin av, og leggja vit dagin til rættis eftir tí.

**Vit bjóða:**
Eitt Mylnuhús við nógvum børnum og vaksnum.
Eitt Mylnuhús í menning.
Eitt Mylnuhús við góðum foreldra- og samstarvsfelagum.
Eitt Mylnuhús har tað er pláss fyri, at bæði børn og vaksin kunnu seta síni »spor«.

**Vit ynskja pedagogar sum:**
Eru fleksibul.
Hava eitt opið sinni.
Eru opin fyri nýhugsan.
Kunnu stuðla við góðum samstarvi í einum stórum stovni.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarnir Hanna Thøgersen og Annie Joensen á tlf. 457788/217788.

Umsóknir til starvið, saman við upplýsing um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 22.01.2002.

**Mylnuhúsið**
Mylnugøta 10
700 Klaksvík

# Hagstova Føroya

Hagstovan sóknast eftir tveimum fólkum við útbúgving frá hægri lærustovni ella tilsvarandi førleika, til at arbeiða við búskaparhagtølum.

**Gjaldsjavnin** og stakpartarnir av honum: Rakstrarparturin við inn- og útflutningi av vørum og tænastum, rentugjaldingum, lønum o.ø. og kapitalparturin við broytingum í nettoskuld til útlond.

**Vinnugreinahagtøl** – serliga roknskaparhagtøl. Hetta eru stakroyndir av virkisroknskapum, sum eru grundarlag fyri uppgerðum av virðisøkingini í marknaðarliga virkseminum í landinum, skift á vinnugreinir.

Bæði arbeiðsøkini verða samskipað í tjóðarroknskapin, og kann tí roknast við heilt sjálvstøðugum arbeiði eins og samskipaðum arbeiði í verkætlanarbólkinum um tjóðarroknskapin.

Bæði starvsfólkini skulu seta seg føran fyri at læra at arbeiða við forriting úr datagrunni. Vit arbeiða við SQL forriting í sambandi við ORACLE datagrunn, sum tó ikki er ein treyt at duga frammanundan.

Bæði starvsfólkini skulu hava hollan kunnleika um samfelagsbúskap, hagfrøði, skráseting og dataviðgerð.

Løn verður latin eftir sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Landsstýrið.

Umsóknarfreistin er **1. februar 2002**, og skal umsóknin sendast

**Hagstovu Føroya**
Postbox 2068
165 Argir.

Meira fæst at vita um størvini frá Hermanni Oskarssyni á Hagstovu Føroya, telefon 352800 og teldupostur hermann@hagstova.fo

# Pedagogur

Søkt verður eftir 1 pedagogi 30 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2002, ella eftir nærri avtalu.

Starvið er á stovu við 11 børnum í aldrinum 1–3 ár.

Vit ynskja at viðkomandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og mennandi gerandisdag í bólkinum
- dugir at samstarva, bæði við starvsfelagar og foreldur.

Lønar- og setunarviðurskifti sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og avvarðandi myndugleika.

Skrivlig umsókn við prógvi, royndum og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 18. januar 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Kristinu Eldevig, leiðara, á tlf. 312853 ella 212853.

**Stella Maris Vøggustova**
Varðagøta 11 · Boks 1202
FO-110 Tórshavn
Tlf. 312853 · Fax 316954

# Kvinna søkist til handil

Vit sóknast eftir tilkomnari kvinnu til handilin at byrja 2. januar 2002.

**Arbeiðtíðirnar eru hesar:**
kl. 05.30 - 13.15
kl. 13.00 - 19.00
allar dagar í vikuni

**Frants Restorff**
Tórsgøta 13

frants restorff

Avloysarastarv sum
# Programmteknikari

Vegna farloyvi er eitt avloysarastarv sum programmteknikari leyst at søkja í Sjónvarpi Føroya frá 1. februar til 15. august 2002.

Arbeiðið umfatar fotografering, redigering og ljóðarbeiði og er skipað í vaktum við skiftandi arbeiðstíðum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya tel 340400 og spyrja eftir Hans Petur Hansen.

Umsóknir við prógvum, CV og ummælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. januar.

team85

**Sjónvarp Føroya**

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.*

# Lærlingur til Saab-verkstaðið

Pláss er fyri lærlingi til mekaniska verkstaðið hjá Saab. Koyrikort krevst.

Vendið tykkum til Heðin Weihe ella Klaus Dahl.

**P/f Meinhardt Arge**
tlf. 345400

# Skeið í 1. hjálp

Fyrstahjálparskeið 12 tímar og/ella 16 tímar byrja 11. og 12. januar, um nóg nógv tekna seg. Hevur tú annað ynski, so sig frá.

Tú kanst tekna teg við at ringja tlf. 319630 ella við telduposti til: redcross@redcross.fo ella við at senda henda lepa inn áðrenn mikudagin 09.01.02 kl. 21.00.

Skeiðini verða hildin um vikuskifti í Havn, uttan so, at nóg nógv tekna seg aðrastaðni, so kann skipast hold uttan fyri Havnina.

Navn ______________________

Bústaður ______________________

Tlf. ______________________

Ynski ______________________